# Citroën - framgongd á flestu marknaðum

**Í 2002 setti Citroën sølumet sætta ári á rað. Á heimsstøði var framgongdin upp á 6,3 prosent. Í Vesturevropa vaks sølan eisini, hóast bilasølan sum heild var minkandi**



BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í Vesturevropa høvdu Citroën ein markanaðarpart upp á 6,7 prosent í søluni av persón- og vørubilum í 2002. Í Fraklandi høvdu Citroën ein marknaðarpart upp á 14 prosent í fjør.

Á marknaðum uttan fyri Evropa vaks sølan við 30 prosentum. Í Kina vaks sølan við 60 prosentum í fjør. Tvey nýggj modell komu á marknaðin í fjør, tað vóru C8 og C3, ið bleiv valdur til »Årets Bil i Danmark 2003«.

Áhugin fyri bilum við dieselmotori er vaksandi og HDI motorarnir hava verið sera væl umtóktir. 54 prosent av Citroën bilunum í Vesturevropa hava dieselmotor. Síðan C3 kom á marknaðin í fjør er ein annar C3 á veg, talan er um C3 Pluriel, ið kemur til Danmarkar í mai/juni.

*C itroën C3 Pluriel. Bilurin kann broytast frá Saloon til Panoramic Saloon, til ein cabriolet, til ein Spider og til ein pickup*



*Her er C3 Pluriel sum Cabriolet*





**Tann nýggi Berlingo gevur øllum barnafamilium ein túr**

Hjálpin og avlastingin er beint við hendurnar -fyri hart royndar barnafamiliur. Tað er bara at rætta tummilfingurin í loft, ta tú hevur tørv á einum túri. Ella enn betur: At keypa ein Berlingo sjálv/ur. So eru tínir flutningstrupuleikar nemliga fyri altíð loystir. Við eini rúgvu av plassi og sera góðum framatkomuligum viðurskiftum í útgávu av einkultari ella tvinnari skjótihurð. Og væl at merkja uttan at tað gongur útyvir keypið av blæðum, barnamatið og at barnaklæðini gerast ov lítil, tí Berlingo er sjalvandi bæði biligur at keypa og ikki minst at koyra -eisini tá næsti familiulimurin stendur í vænti.

**Berlingo**
**1.6i Multispace kr. 168.000,-**
**2.0HDi Multispace kr. 184.000,-**
**2.0HDi v/aircon v.m. kr. 191.000,-**
1.4i & 1.9D fæst eisini
Fæst eisini sum vørubilur

CITROËN

**Ivan Johansen Bilar** Hoyvíksvegur 63
Fo-100 Tórshavn Tel.: 31 36 66
e-mail: ivan@ivan.fo



# Mitsubishi - fleiri nýggir bilar á veg

**Eftir at sølan av Mitsubishi bilum hevur verið fallandi í nøkur ár, er gongdin nú vend. Í 2001 varð ein nýggj verkætlan sett í verk, ið hevur gjørt fyritøkuna rentabla aftur. Næstu árini er ætlanin et koma við hópin av nýggjum modellum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Mitsubishi Colt kemur til Evropa næsta ár*

Í nýggju verkætlanini hjá Mitsubishi er ætlanin at koma við 15 nýggjum modellum í Japan, 12 í Norðuramerika, 14 í Evropa og 12 á Asiu og aðrastaðni í heiminum. Av tí at DaimlerChrysler eiga stóran part í Mitsubishi, koma teir at samstarva við MCC Smart, ið eisini hoyra til DaimlerChrysler. Ein nýggjur Mitsubishi Colt er komin á japanska marknaðin. Næsta ár kemur Colt til Evropa í eini nakað annarleiðis útgávu. Hesin nýggi Colt, ið nú er komin á marknaðin í Japan, er fyrsti bilurin í nýggja konseptinum. Bilurin, ið er gjørdur í samstarvi við DaimlerChrysler, hevur ein framkomnan undirvogn og sera góðar koyrieginleikar. Trygdin og kvaliteturin eru á høgum støði. Nýggi Colt´urin skal eftir ætlan vera við til at fáa veruliga gongd á søluna av Mitsubishi. Colt er eitt gamalt navn hjá Mitsubishi, fyrsti Colt 600 bleiv gjørdur í 1962. Fyrsti Colt kom til Evropa í 1978. Mitsubishi og DaimlerChrysler koma at brúka Colt plattformin til framleiðslu av Smart og Mitsubishi bilum, sum skulu framleiðast á NedCar bilverksmiðjuni í Hálandi.



**Tað er ringt at síggja mun á handverkarum uttan teir koyra Jumper**

**CITROEN JUMPER 2,0 HDi**
Prísir úr 182.000,-
**CITROEN JUMPER 2,2 HDi**
Prísir úr 189.000,-
**CITROEN JUMPER 2,8 HDi**
Prísir úr 211.000,-

CITROËN

Rúmdin manglar ikki. Als ikki í tí nýggja Jumper.

Tí her verður tú førdur inn í eitt stórt og praktiskt vørurúm

Í veruleikanum er tann nýggi Jumper eitt greitt tekin um ta góðsku og ta professionalismu, ið tú nýtir í tíni arbeiðsgongd, og sum ger teg betur føran fyri at lata vøruna eitt sindur betri enn tínir starvsfelagar - hvørja ferð.

Men soleiðis er tað jú, tá tú veliur tær eitt snið í Føroya breiðasta vørubilaúrvali.



CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin 311820